
Mynd: Mureldur

# Tungmálmur á Summar Festivalinum

Ein av harðastu og mest eyðkendu føroysku rockbólkunum verður við á Summar Festivalinum næsta vikuskiftið.

Summar Festivalurin boðar nú frá, at rockbólkurin SIC fer at spæla á festvalinum í næstu viku.

Skráin til Summar Festivalin var annars kunngjørd, men fyrireikararnir hava valt at taka tann originala og harða rockbólkin við afturat.

- SIC spælir harðan og progressivan rocktónleik, og teir hava ein karismatiskan sangara. Innan sítt øki er SIC ein framúr góður bólkur, og tí hava vit tikið teir við á skránna, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum av Summar Festivalinum.

- Hetta slagið av tónleiki hevur ikki verið serliga væl umboðað á festivalinum, men tað gera vit nakað við nú. Vit halda, at tað klæðir Summar Festivalinum væl, at ein bólkur sum SIC eisini er við, sigur hann.

SIC fer at spæla fríggjakvøldið, og tað verður eftir eitt av høvuðsnøvnunum á festivalinum, Melanie C.



# Lena eisini á Summarfestivalinum

**Enn eitt navn er komið á plakatina hjá Summarfestivalinum. Lena fer eisini á pall í Klaksvík um vikuskiftið**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosalurin.fo*

Summarfestivalurin hevur sett nøkur nøvn afturat á skránna síðstu dagarnar, og sum tað seinasta er nú greitt, at Lena eisini verður við, tá Summarfestivalurin verður um vikuskiftið.

Lena og Niclas hava ikki verið nógv at hoyrt í Føroyum í ár, men nú um ólavsøkuna kom vend í, og tey spældu á Futt í Býin konsertini í Tórsgøtu,har framførslan var væl eydnað . Og eisini syrgdu tey á ólavsøku fyri stak hugnaligari og tónleikaliga góðaru løtu í Miðlahúsinum á ólavsøku,

Spæligleði og yvirskot merkir framførslurnar, so óivað er gott í væntu, tá Lena fer á pall í Klaksvík.

# Summar Festivalurin størri enn nakrantíð

**Summar Festivalurin bjóðar tónleik og undirhald á fýra pallum tríggjar dagar**



Fimti Summar Festivalurin er fyri framman, og hetta er mest umfatandi festivalurin, tá ið tað snýr seg um tónleik og undirhald. Fyri fyrstu ferð verða konsertir á stóra pallinum á Vágsbøi í tríggjar dagar, og harafturat verða tríggir pallar brúktir.

- Í fjør tóku vit hósdagin við í skránna fyri fyrstu ferð, men vit brúktu ikki stóra pallin hóskvøld. Tað gera vit í ár, og vit rokna við nógvum fólki hóskvøldið, tí Smokie og Húskallar fara at spæla á stóra pallinum, sigur Erik Biskopstø, sum er ein av fyriskiparunum av Summar Festi-valinum

Stóri pallurin á Vágsbøi verður brúktur til konsertir hósdag, fríggjadag og leygardag. Umframt stóra pallin verða eisini konsertir og undirhald á trimum pallum afturat. Í Flags tjaldinum og á Torginum verða tónleikaframførslur, og einum serligum palli í Silvalandi verður tónleikur og undirhald til yngru festivalgestirnar.

# Tryggur summarfestivalur

**Talið á samarittum, sum millum annað geva fyrstahjálp við skaðum og geva lívbjargandi fyrstahjálp til ein sjúkrabilur kemur, verður størri og størri hjá Reyða Krossi Føroya**

SAMARITTAR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Samstundis er tað eisini vorðið meira vanligt, at fyriskiparar av stórum tiltøkum í Føroyum – herímillum festivalum, konsertum, ólavsøku og líknandi – venda sær til Reyða Kross Føroya við ynskinum um, at samarittar eru til staðar til hesi tiltøk.

- Til komandi summarfestival hava vit sett samarittar fleiri støð í Klaksvík. Harafturat vóru vit eisini til staðar við G! Mini, Futt í býin og á ólavsøku. Í Havn er tað vorðin fastur vani, at hvørja ferð eitt tiltak við yvir 1000 fólkum er, so hevur kommunan eisini samarittvaktar við, sigur virksemisleiðarin fyri samarittarnar í Reyða Krossi Føroya – Bo Warberg.

Samarittar eru sjálvboðin, sum eru útbúgvin í kropsligari og sálarligari fyrstuhjálp. Tey eru sostatt lærd til at geva eina skjóta og nágreiniliga fyrstuhjálp á skaðastaðnum. Bo Warberg sigur frá, at tá ið samarittarnir eru við í teimum heilt stóru tiltøkunum í Føroyum eru teir ofta har í samstarvi við løgreglu og sløkkilið. Løgreglan hevur í summum førum ikki kapasitet nokk til eisini at taka sær av serliga fólki, sum hava fingið smáskaðar, verða ov full og annað.

- Og í tí sambandinum skal strikast undir, at vit hava tagnarskyldu, sigur Bo Warberg.

### Uttan løn

Við tí endamálið at fáa eyka royndir og serkunnleika hava fleiri samarittar í Føroyum harumframt verið við samarittum undir Danska Reyða Krossi á millum annað Roskildefestival og eisini Jellinge tónleikafestival.

Tað eru fyriskipararnir av teimum tiltøkum, har nógv menniskju eru samlaði, sum venda sær til Reyða Kross Føroya við ynskinum um, at samarittar eru til staðar við tiltakið. Sa-marittarnir arbeiða uttan løn. Harafturímóti gjalda fyriskipararnir fyri samarittluttøkuni til Reyða Kross Føroya, sum brúka pengarnar til neyðhjálp, menningarhjálp og sosialt arbeiði.

*Tað eru til tey fólkaríku tiltøkini, at samarittarnir serliga verða bidnir at hjálpa til*

